## Skjóttgangandi glastrevjabátur
## Skagerak 21



*Til sølu um hóskandi boð fæst.*

Motor: Mercruiser 145 HK 3,0 LX
Gongur 30 míl
Er í sera góðum standi.

*Boð undir kr. 125.000 hevur ongan áhuga*

**Fá meira at vit á tlf. 545109 ella 210365**


ShapeWorks™
*Independent Distributor*

**Við hjálp frá shapeworks ber til at regulera tey óynsktu kiloini**



- einfalt og nemt
- orku og yvirskot
- úrslit

Tú fært alla tað vegleiðing og stuðul tær tørvar.

Um hetta ljóðar áhugavert, so ring fyri at hoyra nærri.

**Daniela & Willi Olsen**
TEL 42 23 67 · WWW.NYGGJANFIGUR.NU
*sjálvstøðugir Herbalife forhandlarar*

Sosialurin 341800



**LEIGA**
**AMBOÐ & MASKINUR**
Kaj Andreasen & Co
BREKKUTÚN 7 · 188 HOYVÍK
TEL 31 56 00



Lýsið við brúktum bilum



Sosialurin
www.sosialurin.fo



GEVIÐ BLÓÐ


# KUNNGERÐ
## um ferðslu á ólavsøku 2005

Ólavsøkuaftan og ólavsøkudag 28. og 29. juli frá kl. 14.00 til næsta morgun kl. 08.00 verða hesar broytingar í ferðsluni:

Bilferðsla er **ikki** loyvd eftir **Kopargøtu, á Áarvegnum og niðan á Vaglið, í N. Finsensgøtu frá Vaglinum og niðan til AUTO, ella í Mylnugøtu.** Parkering er heldur ikki loyvd á hesum økjum.

Vanlig bilferðsla er **ikki** loyvd tvørtur um **Niels Finsensgøtu á vegamótinum Bøkjarabrekka/-Steinatún,** undantikin eru hýruvognar, Buss- og Bygdaleiðir.
Um hetta vegamóti gongur støðugt nógv fólk, tí má koyrast við størsta varsemi.

**Í Niels Winthersgøtu, í Steinatúni og í Bøkjarabrekku** er loyvt hýruvognum at søkja hýru.

Meðan kappróðurin fer fram ólavsøkuaftan, er **Eystara Bryggja stongd** fyri vanligari bilferðslu frá **Kongabrúnni til Jónas Broncksgøtu** frá kl. 14.00 til kl. 19.00.

Á parkeringsøkinum á Bursatanga er ikki loyvt at parkera frá 27. juli kl. 20.00 til 29. juli kl. 09.00.

**Tórsgøta frá Sverrisgøtu oman til Vágsbotn er stongd fyri vanligari bilferðslu.**

**Ólavsøkudag,** frá kl. 10.00 til kl. 14.00, verður øll ferðsla um **Vaglið** órógvað og ikki kann roknast við, at koyrandi verður eftir Mylnugøtu, Áarvegnum um Vaglið v.m. vegna skrúðgongu úr Føroya Løgtingi í Dómkirkjuna og aftur.

Tórshavn, hin 22. juli 2005

**POLITIIÐ**


# Toyota - dele
**brugte og nye**

Vi sender hver dag til Færøerne

AABENRAA AUTOGENBRUG
TEL (+45) 74 61 41 10
FAX (+45) 74 61 41 64
www.dkauto.dk · salg@dkauto.dk

Sosialurin 341800



# GSM telefonir &
## GSM & VHF telefonir v.m til skip og bátar

Storno
SØLA & TÆNASTA

Handan Á 6 · Tórshavn
Tel 31 44 14 · Fax 31 80 45
storno@post.olivant.fo


VØGGUSTOVAN OG BARNAGARÐURIN Á KONMANSMÝRU

# Reingerðarfólk

Vøggustovan og Barnagarðurin á Konmansmýru søkir eftir tveimum reingerðarfólkum, at arbeiða í einum toymið á 3 fólk.

Størvini skulu setast umleið 17. august 2005. Arbeiðstíðin er í miðal 14 tímar um vikuna, megin partin eftir klokkan 17.00.

Løn sambært sáttmála við Havnar Arbeiðskvinnufelag.

Meira fæst at vita um starvið við at ringja til leiðararnar á tlf. 317878 ella 313131.

Umsóknarfreistin er úti 15. august 2005 og hava tit onki hoyrt aftur áðrenn 1. september 2005 eru størvini sett øðrum umsøkjarum.

Umsóknir og møgulig viðmælir skulu sendast til:

**Vøggustovuna og Barnagarðin á Konmansmýru**
Hoyvíksvegur 41 B · FO-100 Tórshavn

# Røktarstarvsfólk

Runavíkar kommuna søkir eftir røktarstarvsfólki til **Heimið á Mýrunum** í Runavík.

Talan er um fast starv í niðursettum brøki. Arbeitt verður í skiftandi vaktum.

**Krøv til røktarstarvsfólkið**
- hevur prógv og góðkenning innnafyri sítt fak
- hevur áhuga fyri røkt av minnisveikum fólkum
- hevur hug og hegni at vera um minnisveik fólk
- hevur góð samstarvsevnir
- hevur gott yvirlit og megnar at skipa dagin eftir tørvinum hjá búfólkunum
- er nýhugsandi og hevur hug og árræði at skipa fyri dagligum virksemi fyri tey minnisveiku

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt starvsumhvørvi, har tú kenst gera tína áskoðan galdandi og vera við til at menna umsorgan og røkt
- góða innleiðslu
- undirvísing
- góðar møguleikar til at brúka tíni skapandi og ígongdsetandi evni
- eitt heimligt og hugnaligt umhvørvi, hvar ið hvør einstakur kann kenna seg væl.

**Setanartreytir:**
Løn og setanartreytir smb. sáttmála ímillum viðvkomandi fakfelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um starvið við at tosa við Unn Justinussen, leiðara á tlf. 443065 ella 477080.

Umsókn við avriti av prógvi v.m. skal sendast til:

**Heimið á Mýrunum**
Mýravegur 26
620 Runavík

**Umsóknarfreist:** 15. august.